# ítróttur

Nr. 100 • fríggjadagur • 31. mai 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## Kappróður

**Upptakt til Norðoyastevnuna verður í blaðnum í morgin**

# Peningatrot fer við allari tíðini

**Strembanin eftir at vinna FM kostar nógv, hon ber lítlar inntøkur við sær, og føroysk fótbóltsfeløg fara eisini í framtíðini – á sama hátt sum stór feløg uttanlands gera tað – av og á at kenna fíggjarligan sviða**



*Í fleiri av føroyskum fótbóltsfeløgunum er peningaligi spurningurin vorðin ein stórur trupulleiki, og tó at nógvir kappast um milliónina frá UEFA, so verður tað bert ein vinnari*

NEVNDIR OG PENGAR
*Jóannes Hansen*

Tað hevur verið vaktarskiftið í tveimum av feløgunum, sum eru í 1. deild í fótbólti. Í blaðnum í gjár varð sagt frá, at GÍ hevði aðalfund í síðstu viku, og at nevndin varð skift út, og tað stóð eisini, at KÍ hevði aðalfund týskvøldið, og at formaðurin varð skiftur út.

Í førinum hjá KÍ varð formaðurin skiftur út, tí eitt mótvalevni fekk fleiri atkvøður enn formaðurin seinastu árini. Í GÍ tíðindunum verður einki sagt um hetta, men tað skilst, at talan so at siga var um eina pakkaloysn. Tað vil siga, at øll nevndin, sum sat undan aðalfundinum legði frá sær, og at tað frammanundan var avgjørt, hvørji skuldu manna nevndina. Nýggja GÍ nevndin er fyri tað mesta mannað við sovornum, sum áður hava verið í nevndini.

Nývaldi formaðurin, Jógvan Gregersen, var formaður, áðrenn hann í síðsta valskeiði gjørdist formaður í bygdarráðnum, Sonja á Líðarenda varð formaður, tá Jógvan Gregersen legði frá sær, og Peter Holm var í nevndini saman við hesum báðum. Hinir báðir nýggju nevndarlimirnir hava ikki verið í nevndini, men bæði Regin Gregersen og nýggi næstformaðurin, Brandur Jacobsen, hava verið tætt at GÍ.

### Stór hol

Í blaðnum í gjár varð sagt, at roknskapurin hjá KÍ vísir eitt stórt hall, og at skuldin hjá felagnum er stór. Einki varð sagt um roknskapin hjá GÍ. Men tað er eingin loyna, at árið í fjør royndist út av lagi illa fíggjarliga hjá GÍ. Felagið hevði sera ilt við at halda fíggjarligu skyldurnar, sum teir høvdu yvirfyri venjarum og spælarum, og nú eru teir, sum tá mannaðu nevndina, ikki við meiri. Men skiftið varð framt uttan at talan var um tann dramatikkin, sum tað kanska kann roknast við, tá øll nevndin fór frá.

At fótbóltsfeløgini liggja tungt í sjónum fíggjarliga er ikki ókent. Í heimliga umhvørvinum fór NSÍ ígjøgnum ógvusligan turbolens fyri tveimum árum síðani. Teir hava rættað skútuna, og sambært formansfrágreiðingina, sum hevur verið á heimasíðuni hjá felagnum, so royndist árið í fjør væl fíggjarliga. Ein av orsøkunum var, at teir fingu góðan stuðul frá kommununi.

Tað er eisini alment kent, at HB kom illa fyri, tá pengarnir rullaðu skjótari úr kassanum, enn teir runnu inn. Felagið umlegði tá raksturin av besta liðnum í eitt partafelag, og teir skrúvaðu eitt sindur fyri. Í staðin fyri at keypa spælarar fyri nógvar pengar, søgdu teir seg vilja dúva upp á sínar egnu. Nú er HB aftur á toppinum. Teir hava onkrar spælarar aðra staðni frá, men tað er okkum ókent, hvussu nógvar pengar teir brúka uppá teir.

### Dreymurin og veruleikin

Leiðslustílurin og opinleikin eru ivaleyst ymiskir frá felagi og til felag. Tað valdast um, hvørjir persónarnir eru, sum sita í formanssessum og nevndum. Men undir øllum umstøðum er tað ein veruleiki, at øll tey, sum hava ábyrgd í feløgunum, hava nógv stríð við at fáa pengarnar at røkka.

Av teimum tíggju feløgunum, sum eru í bestu deildini, roknaðu sjey – øll uttan TB, Skála og EB/Streymur – ivaleyst undan kappingarbyrjan við, at tey høvdu møguleika at vinna FM. Umframt æruna, møguleikarnar fyri eyka inntøkum og íblásturin, sum ein meistaraskapur ber við sær, so er ítøkiliga avrokningin frá UEFA stívliga ein millión krónur. Tann upphæddin verður útgoldin á sumri annað árið eftir, at meistaraskapurin er vunnin.

Pengarnir frá UEFA kunnu brúkast sum fíggingargrundarlag undir Europa Cup luttøkuni árið frammanundan, at upphæddin verður goldin út. Tá fíggingin er farin burturav, eru kanska einar átta hundrað túsund krónur eftir á kontoini.

Hetta er tað, sum sjey feløg kappast um, og sum bara ein vinnari er til á hvørjum ári. Feløgini leggja nógv fyri í kappingini. Fíggjarligu fyritreytirnar eru ymiskar kring landið, og hegnið, áræðið og úthaldnið hjá teimum, sum bera stríðið í feløgunum, eru eisini ymisk. Fleiri feløg hava brent seg fíggjarliga, og soleiðis fer tað ivaleyst eisini at verða í framtíðini. Tað ber illa til at sleppa undan hesum. Tey, sum verða vald í nevndir og ábyrgdarsessir, fara eisini í framtíðini at ásanna, at ítróttarligu áhugamálini, sum vóru orsøk til, at tey vórðu vald í álitissessirnar, mugu víkja fyri neyðini at fáa pengar til vega. Tað er gerandisdagurin hjá formonnum og øðrum álitisfólkum í feløgunum.

### Ikki ókent uttanlands

Útlendskir fjølmiðlar fylgja væl við í, hvussu tað gongst m.a. fíggjarliga í fótbóltsfeløgum. Teir hava orku til tað. Og opinleikin kring feløgini er ofta størri, enn hann er eitt nú í Føroyum. Hetta er m. a. tí fleiri av stóru feløgunum eru skrásett á keypsskálunum. Í teimum førunum er ásett, at feløgini skulu boða frá, tá talan er um avgerðir og tiltøk, sum kunnu ávirka raksturin í felagnum og fyritreytirnar annars.

Hesa síðstu tíðina hava fleiri dømi verið um donsk fótbóltsfeløg, sum eru farin av knóranum, ella sum hava verið um at farið av knóranum. Undantakið er FCK, sum tykist svimja í pengum. Brøndby gjørdist meistari, men teir liggja fíggjarliga tungt í sjónum. AB hevði stórt undirskot, AGF var um reppið at fara á húsagang, og í hesi vikuni hoyrdist, at roknskapurin hjá OB vísti eitt hall uppá 20,8 milliónir av primera rakstrinum. Teir høvdu ætlað, at hallið skuldi verða millum sjey og átta milliónir. Á aðalfundinum varð formaðurin skiftur út. Sagt verður at hann longu fyri einum ári síðani boðaði frá, at hann fór ikki at halda fram.

Kim Brinck, sum í síni tíð var venjari bæði í OB og í FCK, er nú ein av løntu stjórunum í OB, og hann sigur, at teir eru við at tuna felagið til at vera eitt stórt fótbóltsfelag. Samstundis ásannar hann, at tað eru vánalig ella eingi útlit fyri, at tað fer at bera til bara við fótbóltsrakstrinum at fáa felagið at bera seg. Sum í FCK og øðrum feløgum verður neyðugt við yvirskoti í øðrum vinnum, um samlaði roknskapurin ikki skal hava reyð tøl í botninum. Dreymurin er at sleppa upp í part í europeisku meistarakappingini og harvið at vinna nógvar milliónir krónur. Men tað ber ikki til at gira útreiðslurnar eftir inntøkunum, sum kanska koma tjúgunda hvørt ár.



# Favorittarnir sigra nærum altíð

## Dystir

**HM-kappingin**

31.05 Frakland-Senegal



*Frakland vann sítt fyrsta HM-heiti á heimavølli fyri fýra árum síðani, og í sumar telist liðið aftur stóru favorittarnar at vinna største heiðurin í fótbóltsheiminum*

*Mynd: Reuters*

**Frakland, Italia, Brasilia og Argentina eru helst fremstu favorittarnir undan HM, og tó at onnur helst fara at arga, so eru tað aloftast favorittarnir, sum standa við gullinum, tá avtornar**

HM-UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Í dag verður tað. Klokkan 12.30 okkara tíð verður fyrsti av teimum 64 dystunum í HM-endaspælinum blástur ígongd. Verður sæð burtur frá OL, so er talan um heimsins størstu ítróttarhending, og kring allan heimin fara skíggjarnir at glitra kring allan heimin. Eisini her heima hjá okkum, hóast fyrstu dystirnir verða leiktir longu hálvgum átta. Tað gerst so ikki við. So má arbeiðið antin bíða, ella kanska verður eitt sjónvarp sett upp í kaffistovuni, so tað onkursvegna ber til at fylgja við.

### Fýra favorittar

Sum útgangsstøði hava øll luttakandi londini sjálvsagt møguleika at gera seg galdandi, og einki er avgjørt, fyrr enn seinasta bríkslið hevur ljóðað, men tað er tó soleiðis, at summi lond verða mett at hava betri møguleika enn onnur. Og tó at vit ofta hava sæð heldur óvæntað úrslit, so er tað altíð tey stóru, sum í seinasta enda fara avstað við heiðrinum sum heimsins besta lið.

Akkurát, hvørjir favorittarnir í ár eru, eru sjálvsagt ymsar hugsanir um, men tað er neyvan at fara heilt skeivur, tá sagt verður, at talan helst verður um ein dyst millum tey fýra, Frakland, Italia, Brasil og Argentina.

Frakland hevur seinnu árini havt heimsins sterkasta lið. Teir eru verjandi heimsmeistarar, og sum teir einastu í søguni kunnu teir samstundis rópa se europameistarar, og tað sigur eisini nakað um ein sigursvilja, sum ikki følnar, bert tí liðið gjørdist heimsins besta. Fyrst og fremst er tann nú so langa sigursrøðin hjá Fraklandi grundað á eitt risa-stórt ungdómsarbeiði, sum franska fótbóltssambandið setti í gongd í 80'unum. Eitt arbeiði, sum nú ber frukt, og sum ivaleyst ger, at Frakland eisini í komandi árunum fer at hava ein stóran leiklut á altjóða pallinum.

Tað kann kosta, at Zidane ikki er tøkur, tá fyrstu dystirnir skulu fáast frá hondini, men hinvegin er liðið kortini so sterkt, at tað uttan trupulleikar skuldi kunna vunnið seg úr bólkaspælinum, og

Italia hevur í mangar mátar havt tað trupult, síðani liðið í 1982 vann HM. Gaman í vunnu teir bronsu á heimavølli í '90 og silvur eftir tapta brotssparkskapping í '94, men onkursvegna hava teir sjáldan fingið stórvegis kredit fyri avrikini. Hetta varð broytt í undanfarnu EM-kapping. Kanska vóru italiumenn hepnir at vinna seg fram til finaluna, men yvirhøvur stóð liðið fyri sera positivum fótbólti. Og tá verjuparturin vanliga er ein av sterku síðunum hjá liðnum, eins og teir duga at standa seg væl í eini langari kapping, so er sannlíkt, at teir kunnu gera seg galdandi.

Tað kunnu brasiliumenn eisini altíð. Liðið hevur kanska ikki staðið seg so væl í undankappingini, sum teir vanliga gera, og undanfarnu tvey árini hava verið merkt av stórari óróð. Men tá tað ræður um HM, so standa allir saman.

Og so nýtist tað heldur ikki at vera ein vansi, at liðið ikki fremsti favoritturin hesaferð. Tað kann gera trýstið á liðið minni, og vinarliga lutakastið viðførir helst eisini, at ráð verða at spara nakrar av týdningarmestu leikarunum í fyrstu dystunum, soleiðis at teir ístaðin eru heilt klárir, tá knock-out skipanin verður tikin í nýtslu.

Argentina verður í ár av mongum mett sum fremsti favoritturin at vinna HM-heitið, og tað er rætt, at liðið í dag hevur eina mest sum óhugnaliga styrki. Møguliga er ein lítil veikleiki at hóma á málverjaplássinum, men í aðrar mátar er talan um spælarar í heimsflokki á øllum plássum. Eisini á beinkinum, har tað kann roknast við, at leikarar sum Batistuta, Crespo og Lopez eisini verða at síggja av og á.

Størsti trupulleikin hjá Argentina verður kanska ikki favoritt-leikluturin. Hendan hava teir roynt fyrr. Men tað kann kosta, at teir eru endaðir í sonevndu »group of death«. Tað kann bera við sær, at tað ikki verður rúmd fyri at hvíla føstu leikararnar, soleiðis at hesir ikki eru eins feskir sum teir hjá mótstøðuliðunum. Men undir øllum umstøðum er tað eitt sterkt Argentina, sum fer undir HM.

### Avbjóðarir

Tá hesi fýra eru nevnd, so sømir tað seg helst eisini at nevna nøkur teirra, sum eisini kunnu gera seg galdandi, tó at tað neyvan verður heilt frammi í oddinum.

Tey vandamestu av hesum eru helst Týskland, Ongland, Portugal og Spania, umframt at eitt land sum Uruguay kanska eisini kann koma upp á tal.

Onkur vildi kanska hildið, at hesi eins væl og tey fýra fyrst nevndu kunnu koma heilt fram í oddin, men tað eru ymsar orsøkir, sum gera, at tey neyvan røkka heilt fram.

Týskland hevur fyrst og fremst ikki staðið seg serliga væl, síðani liðið í '96 vann EM. Og hóast eitt nýtt ættarlið av leikarum nú veruliga er farið at gera um seg, so merkja skaðar hjá týdningarmiklum leikarum, at hópurin er dekan ov tunnur, eins og spælið í ov stóran mun er bygt kring Michael Ballack.

Í Onglandi tykjast øll at hugsa, at bara Beckham verður tøkur, verður alt gott, men soleiðis hongur veruleikin sjáldan saman. Ein leikari einsamallur kann ikki bera liðið til sigurs, og hóast Beckham helst verður tøkur, so er tað framvegis ein dyggur smeitur, at Gerrard ikki er á liðnum. Og so telja væntandi royndirnar hjá Onglandi eisini skeiva vegin. Einki er at ivast í, at liðið hevur møguleika at røkka ovastu tindunum, men talan er í stóran mun um eitt lið, sum hevur framtíðina fyri sær, og har flestu leikararnir í veruleikanum ikki toppa fyrr enn um fýra ár, so enn er helst nakað tíðliga at rópa teir til favorittar.

Fyri iberisku grannarnar, Portugal og Spania, er aloftast galdandi, at tey megna at sláa til í stóru kappingunum. Serstakliga Spania hevur ofta sýnt stórspæl í undankappingunum, fyri síðani at tveita alt burtur, meðan Portugal ofta hevur ilt við at vera nóg væl skipaðir, tá veruliga stóru dystirnir standa á skránni. Fyri bæði er tó galdandi, at leikararnir á liðnum eru somikið frægir, at fellur alt í rættlag kunnu tey basa øllum hinum.

At Uruguay eisini verður nevnt í hesum sambandi, kemst einamest av, at liðið ofta hevur sýnt seg sum eitt gott kappingarlið. Tað vil siga at hóast liðið kanska ikki er heilt so sterkt, so standa teir seg ofta væl í stóru kappingunum. Og í ár hevur liðið eisini fleiri leikarar, sum veruliga teljast millum teir bestu, so møguleikan hava teir.

### Sensatiónirnar

Tá omanfyrinevndu lond verða nevnd sum tey sterkastu, so skal eisini leggjast afturat, at tað nærum altíð er so, at onkur av favorittunum fellur. Eitt HM uttan nakra sensatión er ikki nakað veruligt HM.

Tað er millum annað eisini við hesum fyri eyga, at vit fara at nýta komandi mánaðin framman fyri skíggjan.

Men fyrst av øllum verður tað fyri at síggja fótbólt. Fleiri av bestu leikarunum í heiminum skulu vísa okkum, hvussu vakurt spælið við leðurkúluni kann vera, og so er at vóna, at sjálvt spælið kemur í hásætið. At talan verður um ta sonnu fótbóltsveitsluna, sum eitt HM eigur at vera.